DAGSINS MEINING

Ta› lovar ikki gott

Hvørt mansbarn á fold mann hava hoyrt um Buch og Gore, nú flest allir heimsins fjølmi›lar dag um dag hava bori› tí›indi fram um amerikonsku forsetavalevnini. Eftir óvissu um úrsliti› av valinum fall nú endaliga avger›in í Hægstarætti, sum hevur vi› sær, at Buch ver›ur næsti forseti USA.

Vi› sjálvt vali› í statinum Florida stó› nærum á jøvnum millum Gore og Bush. Hóast republikanska yvirvøldin har útpeika›i Bush til vinnara, so kundu demokratarnir ikki gó›taka hetta m. a. vísandi til, at maskinurnar megna›u ikki at telja rætt. Kravt var› tí, at upptalt var› av n‡ggjum vi› hond. Endin var›, at ein onnur republikansk yvirvøld, hesafer› dómarar í Hægstarætti vístu aftur kravinum um at telja av n‡ggjum vi› hond. Harvi› fekk Bush sigurskransin, og ein vónsvikin Al Gore mátti taka til eftirtektar avger›ina hjá Hægstarætti, tó at hann seg›i seg vera ósamdan.

Tí›in fer at vísa, um naka› hald hevur veri› í skuldsetingunum hjá demokratunum móti uppteljingini í Florida. Í næstum fáa fjølmi›lar og onnur, sum ynskja ta›, fult innlit í atkvøðurnar, solei›is, at tær kunnu teljast umaftur vi› hond. Hóast ta› ikki flytur nakran forseta, so kann ta› gerast ein psykologiskur thrillari av a›rari ver›: at ein forseti fyrst ver›ur tikin í ei› fyri harnæst at kunna ver›a sk‡rdur sum taparin. Ta› ver›ur ein svartur dagur í amerikanskari søgu tá og um ein heilt n‡ggj upptelji›ing og uppger› vi› allar atkvøðurnar ver›ur gjøgnumført. Hinvegin er vanlukkan longu hend, nú mong meta, at avger›in hjá einum dómstóli, sum hevur meirilutan av republikanarum aftan fyri seg, er meira politisk enn løgfrø›ilig. Eftirtí›in fer uttan iva at finna fram til, hvat veruliga fór fram til vali› í Florida, har bró›ur Bush hevur valdi›.

Ein skal helst vera varin vi› ikki at gera ov skjótar ni›urstø›ur. Men nógv bendir á, at vi› Bush sum forseta og vi› tí heri av fyrrv. herna›arpersónum hann fer at hava rundan um seg vi› ovala bor›i› í Hvítu Húsunum, fer heimurin at vera ótryggari at búgva í. Vit kunnu ímynda okkum, hvussu tann veiki, óroyndi og líti› uppl‡sti Bush fer at klára torføra stø›ur, i› kunnu taka seg upp her ikki minst í 3. heiminum, nú hann ver›ur umgirdur av fyrrverandi hermonnum sum rá›gevum! Vit kunnu eisini seta spurnartekin vi›, hvussu stø›an fer at blíva á sosiala økinum í USA, nú ein høgravendur Bush helst fer at skerja henda sektorin. Ella á kriminella økinum, tá allar for›ingar fyri at hava vápn uppi í sær ver›a tiknar burt. Ella tá stórar upphæddir ver›a brúktar til rakettverjuskipanina. Ella tá mannarættindafelagsska pir fara at strongja á at fáa avtiki› dey›arevsing osfr. Bush letst vilja søkja móti mi›juni, men veruleikin er, at hann og hansara stu›lar í nógvum eru at meta sum høgraheykar. Ta› lovar ikki gott fyri hvørki USA ella umheimin.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Minningaror› um Niclas Davidsen á Skúr

f. 19. juni 1974 – d. 25. nov. 2000

Sakni› tungan harmin vekur,
at so dátt vit mistu teg,
Harrin gevur, Harrin tekur,
ei vit skilja Harrans veg;
ei á foldum finnist tann,
lívsins gátu grunda kann:
Best sum sólin fagrast skínur,
dey›in inn um dyrnar trínur.

1974 var eitt gott ár í Nólsoy, ikki kann sigast anna› enn, at bygdalívi› blóma›i. Nógv børn vóru fødd hetta ári›. Á hásumri vart tú borin í heim, bygdin gleddist saman vi› foreldrum tínum.

7 ár seinni, í 1981, fóru vit fyri fyrstu fer› í skúla – flokkurin var stórur, heili 10 børn. Øll høvdu fingi› n‡ggjar heimabundnar troyggjur og n‡ggja skúlatasku. Vit vóru øll spent, hvat mundi henda n‡ggja ver›in fara at bjó›a? Vit vistu ikki, at hesin dagur var grundarlagi› undir sterkum vinarlagi og samanhaldi.

Skjótt funnu vit útav, at henda ver›in veruliga hev›i nógv at bjó›a, vit gjørdust øll sera gó› vinfólk og høvdu nógvar gó›ar upplivingar saman.

24. apríl 1988 fóru vit í kirkju. Vit skuldu konfirmerast. Seks flottir, brúnir le›urjakkar hingu í forkirkjuni, og kirkjufólki› vildi vera vi›, at ta› ikki bara vóru genturnar, sum vóru fínar, men dreingirnir vóru eisini sera flottir í grønum sloyfum. Tí›in eftir konfirmatiónina var serlig fyri okkum. Vit vitja›u hvønn annan til "konfirmatiónsball" og høvdu ta›, sum vera man, stuttligt. Men nakrar mána›ar frammi í tí›ini lá naka› og lúrdi – vit skuldu øll til Havnar at ganga í skúla. Hesin tanki var bæ›i ræ›andi og ikki minst spennandi.

Tey sjey skúlaárini í Nólsoy enda›u vi› einum túri í Hetlandi, sum fer at standa prenta›ur í minnum okkara í allar ævir.

Eftir lokna skúlagongd í Havn fóru vit hvør í sína ætt. Onkur fór av landinum, onnur ví›ari í skúla og onnur at arbei›a. Men floksfelagarnir vóru altí›, av og á, í huganum. Vit hittust eisini av og á at minnast gamlar dagar, og vit høvdu nógv at minnast aftur á – bæ›i gott og ringt.

Ta› gekst okkum væl, hóast ta› var ymiskt hvat vit tókust vi›, øll klára›u seg væl. Onkur enntá so væl, at eitt barn spurdist burturúr. Tú vart tann fyrsti í flokkinum, sum fekk eitt barn, løgi›, hugsa›u vit. Kundi tú ikki havt bí›a eitt sindur? Nú vita vit, at ta› var gott, at tú ikki bí›a›i.

Nú eru vit í ár 2000, 26 ár seinni. Hetta er so sanniliga eitt syrgiligt ár fyri okkum. Tvær fer›ir hava vit hitst í ár. Bá›ar fer›irnar at skriva minningaror› um ein floksfelaga, sum ikki er millum okkum longur. Hvussu kann ta› bera til?

Niclas, tú vart eygnasteinur hjá foreldrum tínum. Tú spreiddi alti› gle›i har tú vart, altí› klárur vi› eini stuttligari vi›merking. Vit hava tíbetur nógv minnir um teg, sum vit vilja goyma í hjørtum okkara.

Vit hugsa nógv um tykkum, sum stó›u Niclasi so nær. Serliga Mariannu, Marnar og Dianu. Eisini lítlu Erlu, sum ikki fekk møguleikan at læra pápa sín at kenna. Vit vita, at tit fara at hava eina svára tí› fyri framman, má Harrin styrkja tykkum í sorg tykkara.

Árgangur '74 í Nólsoy

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldraflatti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Spyrji› serfrø›ingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Svarini ver›a prenta› í bla›num mikudag

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.